UTTAN ÚR HEIMI

# Milosevic slapp undan dómi



*Slobodan Milosevic var ákærdur fyri 66 brot krígsbrotsverk og brotsverk ímóti mannaættini*

*Mynd: Reuters*

**Fyri stuttum kunngjørdi krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia, at málið ímóti fyrrverandi forsetanum Slobodan Milosevic skuldi enda um fimm mánaðir, og at dómur fór at fella í ár. Nú er málið endað uttan dóm**

MOLISEVIC DEYÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað drúgva rættarmálið ímóti fyrrverandi jugoslaviska forsetanum Slobodan Milosevic fekk ein bráðan enda um vikuskiftið, tá tann ákærdi varð funnin deyður í kliva sínum í Haag.

Í gjár kunngjørdi krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia, at Milosevic var deyður av einum hjartatilburði, men at nærri kanningar skulu gerast. Tað ljóðar sannlíkt, at tann 64 ára gamli Milosevic doyði av hjartanum, tí hann hevur í fleiri ár havt ov høgt blóðtrýst og ringt hjarta. So seint sum í februar bað hann um at sleppa til Russlands til kanningar, men dómdtólurin helt tað ikki vera neyðugt, tí niðurlendskir læknar kundu gera kanningarnar.

Kortini vildi høvuðsákærin í krígsbrotsmannadómstólinum, Carla del Ponte, ikki útihýsa tí møguleika, at Milosevic tók lívið av sær, men hon vildi ikki gera nakrar viðmerkingar til, hvussu hann kundi hava beint fyri sær inni í klivanum.



*Í Beograd tendraðu fólk ljós uttan fyri høvuðsskrivstovuna hjá sosialistaflokkinum til minnis um fyrrverandi forsetan*

*Mynd: Reuters*

**Dripin**

Í Serbia ivast fjølmiðlarnir ikki, at Milosevic varð fyribeindur. Haag myrdi hann stóð á forsíðuni á bløðunum Press og Glas Javnosti, og á forsíðuni á Kurir stóð orðið Dripin við stórum stavum oman á einari mynd av honum. Størsta serbiska blaðið, Vecernji Novosti, hevði havt samrøðu við ein lækna, sum kannaði Milosevic í november í fjør.

– Teir vildu hava lívið av honum, sama hvat tað kostaði, tí so kundu teir dylja sannleikan. Nú Milosevic er deyður, er sannleikin eisini deyður, sigur læknin Vukasin Anddric við blaðið.

Blaðið Politika, sum plagdi at stuðla Milosevic, men sum hevur vent sær frá honum í seinastuni, heldur uppá, at gamli forsetin hevði verið frídømdur í Haag, hevði málið ímóti honum komið til dóms. Blaðið heldur, at altjóða samfelagið eigur at kanna virksemið hjá krígsbrotsmannadómstólinum, tá havt verður í huga, at dómstólurin noktaði Milosevic at leita sær læknahjálp í Russlandi.

Politika spyr eisini, hvussu tað ber til, at fyrrverandi forsætisráðharrin í Kosovo, Tamush Haradinaj, sleppur at reka politiskt virksemi úr kliva sínum í Haag. Hann er eins og Milosevic ákærdur fyri krígsbrotsverk.

**Elvt til split**

Krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia kunngjørdi í gjár, at líkið av Milosevic skuldi latast teimum avvarðandi í dag, og at tað síðani er teirra avgerð, hvar hann verður jarðaður.

Samstundis kom fram, at tey avvarðandi eru ósamd um, hvar Milosevic skal jarðast. Einkjan, Mira Markovic, og sonurin, Marko, sum búgva í Moskva, vilja hava líkið flutt til Russlands og jarðað har, men tað vil dótturin, Marija, ikki. Hon sigur, at pápin skal jarðast í heimbygdini Lijeva Reka. Ein eldri bróður fyrrverandi forsetan sigur harafturímóti, at Slobodan skal jarðast í Beograd.

Í gjár var ikki greitt, um einkjan ætlan sær til Haag eftir líkinum. Serbisku myndugleikarnir hava boðað frá, at Mira Markovic fær ikki innferðarloyvi til Serbia.

**FAKTA**

**Stutt um Milosevic**

- Føddur í Pozarevac í Serbia tann 21. august í 1941 og sonur ein lærara í guðfrøði.
- Las løgfrøði og kom sum ungur saman við Miru Markovic. Tey fingu ein son og eina dóttur.
- Hansara politiska frambrot kom í kjalarvørrinum av politisku upployssnini, sum var, tá gamli jugoslaviski leiðarin Tito doyði í 1980.
- Valdur til formann í serbiska kommunistaflokkinum í 1986 og tók við politiska valdinum árið eftir.
- Koyrdur frá tann 5. oktober í 2000 eftir at hava tapt forsetavalið.
- Handtikin og latin krígsbrotsmannadómstólinum í Haag tann 28. juni í 2001.